# um virðum



– Tað er ein sorg at fáa at vita, at tú verður send til hús av arbeiðsplássinum. Tú syrgir yvir at hava mist títt arbeiði, umhvørvið, tínar starvsfelagar. Og við hesum fer mist virði av tær sjálvum. Hví eg?, hevur tú hug at spyrja, og hví ikki síðukammeraturin?
Mynd: Jens Kristian Vang

hevur júst tað menniskjansliga hansara stóra áhuga. Hann sigur, at tað vildi verið at hildið fólk fyri gjøldur at sagt við fólkið, at kreppan ongan týdning hevur. Til at siga tað, hava royndirnar lært hann ov væl. Hann hjálpir okkum ikki fíggjarliga, men hevur kortini onkur gullkorn at geva av, og sum vit kunnu halda okkum til í svárum tíðum. Vit kunnu fylla lastina við okkara góðu virðum við at nýta tíð saman við familju. Vit hava altíð møguleikan at tendra eitt ljós, vit kunnu ganga túrar og syrgja fyri at vera mentalt væl fyri. At sita í kirkjuni ella samkomuni, sum kann veita friðskjól. Eitt lætt sinni kann eisini vera ein stór hjálp í hesum tíðum. Bispur undirstrikar í sama viðfangi, at tað býr nógv gott í menniskjanum, og vit hava lætt við at rætta eina hond, lata mat ella klæðir.

– Bara tað at senda eitt jólakort sigur so nógv. Tað merkir at onkur veit, at tú ert til og hugsar um teg, og tá verður einsemi burtur.

Hann leggur afturat, at tað er ringt at arbeiða til onga nyttu, men tað er sanniliga syrgiligt at stúra til onga nyttu. Enn vita vit ikki hvussu dygt kreppan fer at raka, og tí skal ein ikki stúra til fánýtis. Og heldur ikki lata stúranina blinda okkum, so vit ikki gloyma, tað vit skulu vera takksom fyri.

- Er tað bara í pengunum, vit hava pínu, kunnu vit minna okkum á, at fólk fara í gjøgnum eitt heilt lív við eini heilt aðrari pínu. Eitt nú í sálini. Tí haldi eg, at vit mugu innrætta okkara lív við teimum góðu virðunum, soleiðis at vit minnast til tey, ið hava størri pínu enn vit sjálvi at dragast við.

- Vit mugu ikki missa mótið. Tí lívið er tað vert í sjálvum sær.